# spent bein fyri okkum







*Í flogfarinum hjá FaroeJet verður vøran seld beinleiðis av vogninum Mynd: Vilmund Jacobsen*



*– Tað, sum vit kunnu tjena við leigutúrum, verður "fløtin" hjá okkum, sigur stjórin í FaroeJet, Jóhan E. Simonsen Mynd: Vilmund Jacobsen*

eru eisini við kappingini um at sleppa at flúgva oljufólk.

Stjórin sigur, at tá ið Maersk Air gavst við flúgvingini millum Føroyar og Danmark, beyðst ein møguleiki at skapa eina "forrætning", sum hann tekur til.

– Vit hildu, at nú var tíðin hin rætta at seta á stovn eitt nýtt flogfelag. Tíðirnar eru góðar, og fólk ferðast meira og meira. Við størri útboði og størri kapping á økinum, ivist eg onga løtu í, at fólk fara at ferðast uppaftur meira, enn tey gera í dag.

## Væl móttikin

Á fundinum spurdu vit eisini Jóhan, hvussu hann hevur verið móttikin á flogvøllinum í Vágum og umborð á flogførunum hjá Atlantic Airways, nú arbeitt hevur verið at leggja lunnar undir nýtt flogfelag.

– Jú, eg havi verið væl móttikin, bæði í flogførunum hjá AA, sum eg havi flogið nógv við í seinastuni - og á flogvøllinum, nú vit hava skrivstovu har. Eg havi fingið eina góða tænastu, og eg kann ikki siga, at kappingarneytin á nakran hátt hevur "spent bein" fyri okkum, sigur Jóhan E. Simonsen, stjóri í FaroeJet at enda.



*"Sólja" er í góðveðrinum yvir Gásadali – á heimferðini tysmorgunin Mynd: Vilmund Jacobsen*